# P/F Vága Floghavn

**Flogvøllur 6, FO-380 Sørvágur**

**P/F-Skrás.nr.: 4800**

## Ársfrásøgn

## 2023

| FRUMRIT |
|---|

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 18. apríl 2024.

____________________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Høvuðstøl og lyklatøl fyri konsernina | 6 |
| Høvuðstøl og lyklatøl fyri móðurfelag | 7 |
| Leiðslufrágreiðing | 8 |
| **Konsern- og ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 17 |
| Rakstrarroknskapur | 24 |
| Fíggjarstøða | 25 |
| Eginognaruppgerð fyri konsernina | 27 |
| Eginognaruppgerð fyri móðurfelag | 27 |
| Pengastreymsuppgerð | 28 |
| Notur | 29 |

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2023 hjá P/F Vága Floghavn.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virkseminum og peningastreymunum hjá konsernini og felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Sørvágur, tann 18. apríl 2024

**Stjórn**

Regin Ingolfsson Jakobsen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Birita Sandberg Samuelsen<br>nevndarforkvinna | Janus Páll Rein<br>næstformaður | Uni Danielsen<br>nevndarlimur |
| Gunn Hanusardóttir Møller<br>nevndarlimur | Tórstein á Steig<br>starvsfólkavalt umboð | Egil Brandurson Joensen<br>starvsfólkavalt umboð |
| Nanny Ritter Falkvard<br>starvsfólkavalt umboð | | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Til kapitaleigaran í P/F Vága Floghavn

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Vága Floghavn fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognar-uppgerð, pengastreymsuppgerð og notum fyri bæði konsernina og felagið. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2023 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virkseminum og peningastreymunum hjá konsernini og felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin". Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum , uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 18. apríl 2024

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vága Floghavn<br>Flogvøllur 6<br>FO-380 Sørvágur | |
| | Telefon: | 354400 |
| | Telefax: | 354401 |
| | Heimasíða: | www.fae.fo |
| | Skr.nr.: | 4800 |
| | V-tal: | 566713 |
| | Stovnað: | 14. juni 2007 |
| | Heimstaður: | Sørvágur |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Birita Sandberg Samuelsen, nevndarforkvinna<br>Janus Páll Rein, næstformaður<br>Uni Danielsen, nevndarlimur<br>Gunn Hanusardóttir Møller, nevndarlimur<br>Tórstein á Steig, starvsfólkavalt umboð<br>Egil Brandurson Joensen, starvsfólkavalt umboð<br>Nanny Ritter Falkvard, starvsfólkavalt umboð | |
| **Stjórn** | Regin Ingolfsson Jakobsen, stjóri | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |
| **Dótturfelag** | P/F Duty Free, Sørvágur | |

## Høvuðstøl og lyklatøl fyri konsernina

| | 2023<br>t.kr. | 2022<br>t.kr. | 2021<br>t.kr. | 2020<br>t.kr. | 2019<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Nettosøla | 178.262 | 160.057 | 103.280 | 77.531 | 145.853 |
| Bruttoúrslit | 82.092 | 79.521 | 45.661 | 30.696 | 70.358 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 23.129 | 23.301 | 436 | -15.305 | 19.413 |
| Fíggjarligir postar, netto | -4.737 | -1.767 | -1.549 | -1.541 | -1.570 |
| Ársúrslit | 3.864 | 8.811 | -5.623 | -17.586 | 5.417 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 978.552 | 907.239 | 895.102 | 897.067 | 919.374 |
| Eginogn | 838.069 | 834.205 | 825.394 | 831.017 | 833.603 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstrarvirksemi | 33.487 | 37.293 | 19.031 | -6.429 | 29.941 |
| Íløguvirksemi | -79.656 | -19.197 | -11.358 | -6.530 | -18.382 |
| Fíggjarvirksemi | 39.197 | -8.492 | -3.485 | 3.147 | -10.256 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Miðaltal av fulltíðarsettum starvsfólkum | 68 | 65 | 53 | 54 | 60 |
| **Lyklatøl í %:** | | | | | |
| Eginognarpartur | 85,6 | 91,9 | 92,2 | 92,6 | 90,7 |
| Eginognaravkast | 0,5 | 1,1 | -0,7 | -2,1 | 0,7 |

Høvuðs- og lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal".

## Høvuðstøl og lyklatøl fyri móðurfelag

| | 2023<br>t.kr. | 2022<br>t.kr. | 2021<br>t.kr. | 2020<br>t.kr. | 2019<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Nettosøla | 74.395 | 68.697 | 48.704 | 41.019 | 63.777 |
| Bruttoúrslit | 46.266 | 47.865 | 31.497 | 24.307 | 41.960 |
| Úrslit av vanligum rakstri | -2.190 | 1.151 | -7.585 | -17.181 | -1.597 |
| Fíggjarligir postar, netto | 6.054 | 7.660 | 1.962 | -584 | 7.262 |
| Ársúrslit | 3.864 | 8.811 | -5.623 | -17.586 | 5.417 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 959.486 | 889.672 | 883.024 | 892.333 | 901.567 |
| Eginogn | 838.069 | 834.205 | 825.395 | 831.017 | 833.604 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstrarvirksemi | 15.597 | 17.618 | 10.808 | -5.722 | 10.407 |
| Íløguvirksemi | -71.413 | -12.715 | -10.612 | 2.511 | -11.382 |
| Fíggjarvirksemi | 47.198 | -3.492 | -3.484 | 12.146 | -3.256 |
| Pengastreymar tilsamans | -8.618 | 1.411 | -3.288 | 8.935 | -4.231 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Miðaltal av fulltíðarsettum starvsfólkum | 49 | 47 | 38 | 44 | 45 |
| **Lyklatøl í %:** | | | | | |
| Eginognarpartur | 87,3 | 93,8 | 93,5 | 93,1 | 92,5 |
| Eginognaravkast | 0,5 | 1,1 | -0,7 | -2,1 | 0,7 |

Høvuðs- og lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal".

## Leiðslufrágreiðing

### Virksemi

P/F Vága Floghavn varð stovnað á aðalfundi 14. juni 2007 við heimild í løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2007. Endamál felagsins er at reka flogvallarvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

### Gongdin í 2023

Nú 2023 er farið afturum ber til at siga, at gongdin aftur er farin at líkjast tí, vit sóu áðrenn farsóttin fór at herja. Ferðslumynstrið líkist nú sær sjálvum, og ferðafólkatalið er nú komið upp á stigið, vit vóru von við, enntá nakað hægri. 2023 gjørdist sostatt metár, hvat ferðafólkatali viðvíkur.




Nú ferðslan aftur er komin fyri seg, hevur økta virksemið vaksandi starvsfólkatørv við sær. Vága Floghavn er í tí hepnu støðu, at tað ikki hevur staðið á at fáa skikkað fólk. Vit meta okkum sum støðan er at hava brynjað okkum til komandi tíðina, men so hvørt virksemið veksur má starvsfólkahópurin tillagast.



## Leiðslufrágreiðing

Vaksandi ferðafólkatalið og økta virksemið hevur eisini avbjóðingar við sær. Fleiri stórar íløgur eru framdar seinastu árini og enn størri liggja fyri stavn. Hóast inntøkurnar vaksa, fylgja útreiðslurnar við, ikki minst tær, sum óbeinleiðis hava við stóru íløgurnar at gera. Hetta sæst aftur í fíggingarkostnaðinum, sum er vaksin munandi.

Bruttoúrslitið fyri árið gjørdist 46.266 t.kr., sum er heldur minni enn tær 47.865 t.kr. fyri 2022. Nú ferðafólkatalið setti met er tað sum vera man ferðafólkagjaldið, sum er tann størsta inntøkukeldan hjá felagnum. Úrslitið hjá samtakinum eftir skatt gjørdist eitt avlop upp á 3.864 t.kr., í mun til 8.811 t.kr. árið fyri. Hetta metir leiðsla felagsins eftir umstøðunum vera nøktandi.

Samtaksroknskapurin fevnir um P/F Vága Floghavn sum móðurfelag og P/F Duty Free sum dótturfelag, sum Vága Floghavn eigur helvtina av og hevur avgerandi ávirkan á. Samtakið gav í 2023 eitt bruttoúrslit upp á 82.092 t.kr. ímóti 79.521 t.kr. árið fyri. Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 13.960 t.kr., ímóti 17.652 t.kr. árið fyri. Av hesum var parturin hjá minnilutaáhugamálum ávikavíst -10.096 t.kr. í 2023 og -8.841 t.kr. í 2022.

Floghavnarvirksemi er ein serstakliga rakstrar- og íløgutung vinnugrein og alneyðugt er tí støðugt at hyggja at møguligum tillagingum, soleiðis at flogvøllurin, farstøðin og tænastubygningarnir nøkta tørvin hjá brúkarunum. Tað gerst bara alt meira týðiligt, at umstøðurnar ikki eru nøktandi longur, nú nýtt met varð sett í ferðafólkatali í 2023 og útlit eru fyri framhaldandi vøkstri komandi árini. Vága Floghavn stendur tí framman fyri sera stórum íløgum.

Fleiri verkætlanir eru settar í verk fyri at bøta um umstøðurnar. Viðførismóttøkan er útbygd til hálvatriðju ferðir upprunastødd og varð liðug í mars 2024. Nýtt standpláss til flogfør er í gerð og verður klárt at taka í nýtslu ímóti sumri 2024, útgrevstur, spreinging og planering er í gongd sum fyrireiking til hangarbygging og P-pláss til bilar. Alt átrokandi neyðugt at fáa framt sum skjótast.

Næsta stóra verkætlanin, sum eftir ætlan skal setast í verk, er at útbyggja farstøðina. Verandi farstøð, sum í síni tíð varð bygd til eitt heilt øðrvísi ferðslumynstur enn tað, vit kenna í dag, er týðiliga vorðin ov lítil. Vága Floghavn væntar, at vøksturin í ferðslu næstu 15-20 árini fer at hava við sær, at ferðafolkatalið fer upp um eina millión tá vit nærkast 2040 í seinasta lagi. Tílíkari ferðslumongd klárar verandi farstøð als ikki at rúma. Um byggjast skal út til henda tørv er sjálvandi talan um risaíløgu. Seinasta metingin, sum er frá 2022, sigur at nýggj farstøð kostar góðar 600 mió.kr.

Íløgur av slíkari stødd verða ikki gjørdar uttan skynsaman og effektivan rakstur. Leiðsla felagsins hyggur tí støðugt at møguleikum fyri at tillaga grundraksturin, fyri at halda hann so skynsaman sum til ber. Samstundis verður hugt at møguligum broytingum í kørmum, sum kunnu vera við til at betra um upplivingina hjá viðskiftafólkunum. Økti íløgutørvurin komandi árini krevur sostatt áhaldandi góð rakstrarúrslit. Nevnd og leiðsla í Vága Floghavn hava lagt seg eftir at leggja eina varliga rakstrar og íløguætlan, soleiðis at fyritøkan er væl brynjað til framtíðina og framtíðar íløgur.

### Nýggjar inntøkur og meiri virksemi

Størsta inntøkukelda felagsins er eins og undanfarin ár gjøld frá ferðafólkum. Hóast hesar inntøkur fara at vaksa saman við ferðafólkatalinum, er áhaldandi tørvur á at menna nýggjar inntøkumøguleikar. Felagið hevur aðrar inntøkur, sum hava roynst væl, til dømis eru inntøkur av parkering, leigugjøldum og bilaútleigan o.a. vorðnar ein alt meira týðandi partur av inntøkugrundarlagnum. Tørvur er kortini framvegis á at arbeiða miðvíst við at vaksa um nýggju inntøkurnar, samstundis sum aðrar verða mentar, til dømis handling og farmur, eins og umstøðurnar at reka virksemi í Vága Floghavn alla tíðina eiga at verða mentar.

### Skráseting av tjóðskapi hjá ferðafólki

Síðani ársbyrjan í 2019 er bústaður og tjóðskapur hjá teimum ferðandi skrásettur í sambandi við fráferð. Talan er um týðandi hagtøl, tí tey siga rættiliga nógv um samansetingina av teimum, sum ferðast til og úr Føroyum loftvegis. Hagtølini eru eisini kærkomin hjá ferðavinnuni, tí fyrr hevur einans borið til at gitt um, hvussu nógvir útlendingar koma til Føroya.

Tað vísir seg, at meira enn helmingurin av teimum ferðandi eru búsitandi uttanlands. Samstundis er mynstrið rættiliga støðugt, undantikið í 2020 og 2021, tá farsóttin herjaði. Í 2019 búðu 54% av teimum ferðandi uttanlands, og bæði í 2022 og 2023 vóru tey 57%. Íroknað hesum eru føroyingar búsitandi uttanlands, og draga vit hesar frá er talan so at siga um helvtarbýti.




Um vit hyggja at tølunum fyri hesi trý árini vit hava verið omanfyri 400.000 ferðandi vísir tað seg, at tey kunnu greinast soleiðis, um vit rokna í rundum tølum: talan er um 400.000 ferðandi báðar vegir. Tað merkir, at vit í mesta lagi kunnu hava havt 200.000 einstakar ferðandi. Av hesum vóru 51-52% føroyingar.

## Leiðslufrágreiðing

Nú eru undir 100.000 eftir, sum eru útlendingar. Av royndum vita vit, at rættliga stórt tal av útlendingum koma til Føroya í arbeiðsørindum. Ein rættiliga eftirfarandi meting er, at um 35.000 av teimum ferðandi koma higar í arbeiðsørindum, og eru tískil ikki turistar í landinum. Hetta merkir, at talan er um onkrastaðni millum 60.000 og 70.000, sum komu higar í frítíðarørindum burturav hesi árini.




### Fleiri flogfeløg

Vága Floghavn hevur sum eitt aðalmálum sínum at virka fyri at víðka um útboðið av ferðamálum til viðskiftafólkini. Hetta verður serliga gjørt við at royna at fáa fleiri flogfeløg at nýta floghavnina, og á henda hátt geva viðskiftafólkum okkara eitt størri úrval. Samstundis gagnar hetta felagnum, tí tað er sum vera man av týdningi, at hava fleiri heldur enn færri flogfeløg sum regluligar kundar.

Skrásetingar okkara av tjóðskapartølum vísa heilt greitt, at nýggj flogfeløg koma við nýggjum kundasegmentum, tað vil siga viðskiftafólk, sum neyvan vóru komin hendan vegin, um nýggju feløgini ikki bjóðaðu sínar tænastur fram. Við øðrum orðum verður "kakan einans størri", so at siga.

### Loftfarmur

Arbeitt hevur verið í rúma tíð við eini verkætlan, sum hevur til endamáls at útflyta laks loftvegis, í fyrstu syftu til Amerika, men sum frá líður væntandi til onnur lond við. Talan er um verkætlan, sum felagið FarCargo er farið undir við einum flogfari av slagnum Boeing 757-200. Hetta er eitt lutfalsliga stórt farmaflogfar, sum fermir millum 30 og 40 tons hvønn túrin. Fyri Vága Floghavn merkir hendan verkætlan, at íløgur eru gjørdar í nýggja farmahøll, útgerð og førleikamenning av fólki.

Herumframt krevur flúgving við flogførum av hesari støddini serligar myndugleikagóðkenningar við atliti til trygd. Tilgongdin til slíkar góðkenningar er serstakliga drúgv, men væntast endaliga avgreidd frá myndugleikunum í apríl 2024. Fyrstu tíðina verður farmaflúgvingin tí avgreidd við einum fyribilsloyvi og fyrstu royndirnar hava gingið serstakliga væl. Fyrsti farmatúrur hjá FarCargo úr Føroyum til New York var tann 5. mars 2024 og eftir ætlan verður flogið 2 ferðir vikuliga úr Føroyum ta fyrstu tíðina.

## Leiðslufrágreiðing

Verkætlanin er eitt nýtbrot í føroyskari flogvinnu og kann fara at broyta bæði útflutning og innflutning munandi. Eingin ivi er um, at hetta fer at hava heilt nýggjar møguleikar við sær, og kann við tíðini geva bæði flogvøllinum og Føroyum sum heild eitt bein afturat at standa á.

**Væntanir fyri 2024**

Tá 2023 byrjaði miðaðu vit eftir at taka ferðafólkametið, sum varð sett í 2019. Hetta eydnaðist og kunnu vit ikki annað enn vera nøgd við tað, hóast metið var tepurt.

Vága Floghavn hevur góðar vónir um ferðsluna í 2024 og um ikki okkurt óvæntað ávirkar gongdina vænta vit, at 2024 verður enn eitt metár. Ferðslumynstrið er farið at líkjast meira tí vit sóu áðrenn farsóttina, og vit halda okkum hava orsøk at vænta, at vøksturin fer at halda fram. Hóast búskaparligt órógv hevur valdað seinastu tíðina, m.a. við sveiggjandi rentustigi og prístali, hevur hetta ikki enn ávirkað arbeiðsloysið merkisvert. Útlitini tykjast sum heild vera góð, og vit halda okkum hava orsøk at vænta eina javna, góða gongd komandi árini.

Ófriðurin í Eystureuropa órógvar sjálvandi framvegis, bæði her í Europa, men eisini er hann rættiliga avmarkandi fyri ferðslu til og úr Fjareystri. Hetta er fyrst av øllum ein sorgarleikur fyri borgararnar í Ukraina, men eisini er skilligt, at kríggið hevur lutfalsliga stórar avleiðingar fyri flogvinnu.

Framvegis tykist vera ein ávísur útlongsul millum føroyingar, aftaná stongsilin undir Covid-19. Sama tykist vera galdandi uttanum okkum og nógva, jaliga umrøðan, sum Føroyar hava fingið sum ferðamál í altjóða miðlum seinastu árini, fer væntandi at hava við sær, at fleiri ferðandi hava hug at koma hendan vegin, kanska serliga úr okkara grannalondum. Nú Icelandair hevur boðað frá, at tey fara at flúgva millum Føroyar og Ísland verður samstundis latið upp fyri eini lættari farleið hjá ferðandi úr USA og Kanada at koma hendan vegin. Áhugavert verður at síggja, hvussu hetta kemur at merkjast.

Lutfalsliga lítil partur av árinum er farin og trupult er at meta um, hvussu árið sum heild fer at hilnast búskaparliga. Byrjanin av árinum hevur verið á eini góðari leið í mun til fíggjarætlan og er ein varislig meting, at raksturin fer at standa upp og niður, tá árið fer at halla.

**Útbyggingar**

**Vága Floghavn útbygd**

Stórar útbyggingar vórðu framdar í sambandi við at floghavnin varð yvirtikin í 2007. Tá varð partur av avtaluni, at Íleggingargrunnurin fyri Føroyar varð niðurkapitaliseraður við 365 mió.kr., sum skuldu nýtast til útbyggingar av Vága Floghavn. Størsti denturin varð lagdur á at bøta mest møguligt um atkomuviðurskiftini, og tí hevði leinging av flogbreytini hægstu raðfesting. Breytin varð tá longd úr 1.250 metrum upp í 1.799 metrar.

## Leiðslufrágreiðing

**Farstøðin og tænastubygningar**

Tað, sum ikki varð nýtt til leinging av breytini, varð í høvuðsheitum nýtt til nýggja farstøð og tænastubygning. Hesi stóðu liðug á sumri 2014 og vórðu tá mett at geva Vága Floghavn góðar møguleikar at mennast komandi árini. Kortini mátti eftir fáum árum ásannast, at vit eru yvirhálað av veruleikanum, nú illa ber til at siga, at vit veita ferðafólkunum best møguligu upplivingina, tí karmarnir av álvara eru vorðnir ov trongir.

Farstøðin varð teknað soleiðis, at hon er egnað at avgreiða umleið 400.000 ferðandi árliga. Hetta skal takast við tí fyrivarni, at bæði støðd á flogførum og títtleikin av komum og fráferðum hava avgerandi týdning fyri eina slíka meting. Flogførini vóru tá einans helvtina til støddar av tí, vit síggja nú, eins og komur og fráferðir eru munandi fleiri í hesum døgum. Metingarnar tá vístu, at tey 400.000 fóru at verða rokkin í 2025, men longu í 2019 varð farið upp um.  Farstøðin er tí av álvara vorðin ov lítil.

Vága Floghavn hevur saman við serfrøðini gjørt eina heildarætlan fyri framtíðar útbyggingar av floghavnini, og eru bæði heildarætlan og byggiskrá liðug og til reiðar at fara undir. Umframt hetta eru gjørd skitsuuppskot og kostnaðarmeting av eini farstøð, sum nøktar tørvin komandi 15-20 árini. Tørvurin á útbyggingum er átrokandi, tí ferðslan er farin upp um tað, farstøðin kann rúma. Neyðugt er tí veruliga at fara undir ítøkiligar fyrireikingar, ikki minst er tørvur á at útvega kravdu fígging.

**Rakstur og viðlíkahald í 2023**

At reka floghavn er rættiliga kostnaðarmikið, tí so at siga alt tilfar og útgerð er sergjørt til hesa vinnu, og harvið ógvuliga dýrt. Vága Floghavn hevur eitt ógvuliga stórt øki at fara um – omanfyri 1.000.000 fermetrar – umframt nógvar bygningar, maskinur og útgerð. Rakstur og viðlíkahald av bæði bygningum, flogbreyt, vegum, hegnum o.s.fr. er tí sera umfatandi og fíggjarliga krevjandi.

Myndugleikakrøv til floghavnir verða afturat hesum støðugt broytt og herd og hava hesi við sær, at rakstur og mannagongdir mugu tillagast.  Hetta setur stór krøv til íløgur og eftirútbúgvingar til starvsfólk, soleiðis at floghavnin altíð livir upp til øll ásett krøv.

Felagið hevur gjøgnum árini framt eina skipaða tilgongd fyri at ganga hesum á møti.  Virksemið á flogvøllinum er lagt til rættis sambært hesum, samstundis sum ætlan er løgd fyri hvussu tól, samskiftisútgerð, bilar og maskinur verða skift.

Asfaltið á gamla partinum av lendingarbreytini er frá 1992, og tí stendur nýtt asfalt frammarlaga á íløguætlanini. Í 2016 varð hesin partur av asfaltinum viðgjørdur við eini serligari viðgerð, soleiðis at haldførið á asfaltinum varð økt nøkur ár afturat, men nú kann neyvan verða bíðað leingi, til neyðugt verður at leggja nýtt lag á.

### Onnur mál

**Framtíðarútlit fyri menning og vøkstri hjá Vága Floghavn**

Nevnd og leiðsla felagsins hava grundleggjandi góðar vónir um framtíðina. Ófriður úti í heimi kann koma at ávirka flogvinnuna, og tí er framvegis ilt at meta um, hvussu komandi tíðin verður. Hetta kann ávirka rakstur felagsins, so hóast stórt arbeiði er gjørt fyri at menna inntøkugrundarlagið, so er torført at meta um, hvussu fer at gangast. Arbeiðið við at breiðka um inntøkugrundarlagið heldur fram, soleiðis at raksturin kann verða hildin burðardyggur, og megnar at standa ímóti møguligum framtíðar nosum.

**Útbygging av farstøðini**

Skal Vága Floghavn brynja seg til væntaða vøksturin í ferðafólkatali komandi árini er neyðugt við eini munandi útbygging av farstøðini. Framskrivingarnar, sum liggja sum grundarlag undir heildarætlanini fyri floghavnina næstu 15-20 árini, vísa, at roknast kann við einari millión ferðandi, tá vit koma fram ímóti 2040, í seinasta lagi. Verandi farstøð er egnað til avgreiðslu av 400.000 ferðandi árliga, og skulu viðurskiftini vera nøktandi til so stórt ferðafólkatal verður talan um ein bygning, sum er út ímóti fýra ferðir støddina av hesum vit hava í dag. So stórur bygningur er kostnaðarmikil, og sær ein tílík ætlan neyvan dagsins ljós uttan vælvild frá eigaranum av floghavnini.

**Nýtt øki til hangarar**

Ein av stóru avbjóðingunum í floghavnini er, at Atlantic Airways ikki fær flogfør síni inn í verandi hangar, tí hann er ov lítil. Hangarurin varð í síni tíð bygdur til smáu flogførini nýtt vórðu, tá felagið av fyrstan tíð fór á flog. Samstundis er verandi staðseting óheppin í mun til framtíðarætlanirnar hjá Vága Floghavn. Neyðugt er tí at útvega annað øki og gera hetta byggibúgvið til nýggjar hangarar. Farið er undir hetta arbeiðið og verður væntandi greitt at fara undir bygging av nýggjum hangari innan langt er fráliðið.

**Víðkan av parkeringsøki til bilar**

Í teimum tíðarskeiðum, tá nógv ferðsla er um flogvøllin, er parkeringsøkið hjá Vága Floghavn ov lítið. Hetta kemur javnan fyri, og er ikki ein støða vit kunnu bjóða okkara viðskiftafólkum. Tí varð í heyst farið undir at víðka um parkeringsøkið. Hetta arbeiðið verður gjørt í einari og somu arbeiðsgongd, nú hangarøkið verður gjørt. Á henda hátt ber til at nýta tilfar úr øðrum økinum til uppfylling í hinum og soleiðis spara bæði tíð og pening.

Nevnda verkætlan er stór og tekur væntandi úti við trý ár, áðrenn hon er liðug. Fyri at bøta um støðuna hevur Vága Floghavn tí tikið stig til eina fyribilsloysn, sum fer at hava við sær at einir 100-120 P-básar verða tøkir afturat. Henda loysn verður klár áðrenn komandi háárstíðina.

**Víðkan av viðførismóttøkuni**

Ein av størstu avbjóðingunum í farstøðini hevur verið viðførismóttøkan. Útbyggingin av henni er liðug í mars 2024, og nú hon er tikin í nýtslu er talan um eina víðkan úr umleið 250 m2 upp í 630 m2, svarandi til hálvatriðu ferðir upprunastøddina.

## Leiðslufrágreiðing

### Brennievni til flogfør og tyrlur

Í samstarvi við veitaran av brennievni er felagið í ferð við at fáa gjørdar brennievnistangar, fyri at tryggja eina nøktandi goymslu av brennievni. Henda íløga hevur fleiri endamál. Bæði kemur hon at tryggja, at nøgdin av brennievni í landinum verður munandi størri enn nú, umframt at henda samstundis skal tryggja, at brennievnisprísurin kemur niður á eitt stig ið líkist tí í grannalondum okkara.

### Tilbúgving og ávaringartænasta

Í tíðini fram til mai mánaða í 2007 átti danski staturin Vága Floghavn, og stóð umvegis Statens Luftfartsvæsen (SLV) fyri virkseminum í floghavnini. Tá varð flogvøllurin yvirtikin av føroysku myndugleikunum. Partafelagið, P/F Vága Floghavn, varð stovnað, og ognir og virksemi vórðu løgd í felagið hin 1. januar 2008.

Síðani byrjan hevur floghavnin veitt eina tilbúgvingartænastu sum hevur við sær, at floghavnin allar dagar í árinum kann verða mannað við stuttum skotbrái uttanfyri vanliga upplatingartíð – til til dømis í sambandi við sjúkraflutning, search and rescue ella líknandi. Talan er um eina rættiliga kostnaðarmikla tænastu, sum danski staturin í síni tíð fíggjaði umvegis donsku fíggjarlógina, sum eitt slag av beinasemi til føroyska samfelagið.

Í stuttu tíðini flogvøllurin var almennur føroyskur stovnur varð henda tænasta fíggjað umvegis føroysku fíggjarlógina, men síðani P/F Vága Floghavn yvirtók virksemið hevur Vága Floghavn umvegis raksturin fíggjað hesa tænastu.

Sama er galdandi fyri aðra týðandi tænastu, sum P/F Vága Floghavn veitir føroyska samfelagnum. Talan er um tað vit vanliga kalla Ávaringartænastu og hevur hon við sær, at øll flogfør og tyrlur, sum flúgva í føroyska loftrúminum í eini hædd upp til 7.500 fót, skulu hava regluligt samband við tornið í Vága Floghavn. Eisini henda tænasta er rættiliga kostnaðarmikil hjá Vága Floghavn at veita.

### Marknaðarføring

Vága Floghavn tekur javnan lut á útvaldum sølustevnum uttanlands og roynir at gera vart við seg, fyri at økja um áhugan fyri bæði flogvøllinum og Føroyum sum ferðamannalandi. Framvegis er týðiligt at merkja, at áhugin fyri Føroyum er stórur, bæði millum flogfeløg og onnur feløg innan ferðavinnu. Sostatt meta vit góðan møguleika vera fyri, at menna henda partin av ferðavinnuni væl meira.

### Starvsfólka- og førleikamenning

Einki vinnufelag fær líkinda úrslit uttan dugnalig og nærløgd starvsfólk. Vága Floghavn hevur serstakliga dugnaligan og nærlagdan starvsfólkahóp, sum í veruleikanum er týdningarmesta tilfeingi felagsins. At starvast innan flogvinnu er óvanliga krevjandi, tá tað kemur til útbúgving og førleikar, og Vága Floghavn leggur alstóran dent á, støðugt at menna starvsfólkahópin so hvørt sum tørvurin broytist. Starvsfólkamenning og -trivnaður eru tí øki, sum felagið ynskir at hava í hásæti.

### 2024 higartil

Enn er lítið farið av nýggja árinum, men higartil síggja vit eina framgongd í ferðsluni á millum 6 og 7 prosent í mun til í fjør. Ilt er at meta um, hvussu árið fer at hilnast, men væntanirnar eru góðar. Hóast nýtt mett varð sett í 2023 halda vit orsøk vera at rokna við enn hægri tali í ár.




### Samanumtikið

Samanumtikið hevur Vága Floghavn góðar vónir fyri 2024. Sum viðleikari hjá føroysku ferðavinnuni eru vit sannførd um, at áhugin fyri Føroyum sum ferðamáli framvegis er vaksandi og at føroyska ferðavinnan uttan iva hevur eina bjarta framtíð.

Ein av kjarnuuppgávunum hjá Vága Floghavn er at betra um umstøðurnar hjá teimum ferðandi, samstundis sum virksemið á flogvøllinum verður framtíðartryggjað best møguligt. Fyri at røkka málunum er neyðugt at tryggja betri inntøkumøguleikar innan øll virkisøki felagsins. Ein tryggur, sunnur grundrakstur er ein fyritreyt fyri at megna stóra íløgutørvin komandi árini.

Vága Floghavn arbeiðir framhaldandi við at menna umstøðurnar á flogvøllinum og at kanna møguleikarnar fyri at økja reglusemið enn meira og tryggja, at okkara góðu samstarvsfelagar, eitt nú Atlantic Airways, SAS, Widerøe, Icelandair, FarCargo og onnur fáa so góðar umstøður sum gjørligt til at menna sítt virksemi.

Eisini vil Vága Floghavn framhaldandi arbeiða við langtíðar menningarætlanum fyri at tryggja støðugan ferðafólkavøkstur og at menna føroysku flogferðsluna og ferðavinnuna, eins og vit vilja virka fyri framhaldandi at menna flogfarmavinnuna.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparárslok fram til í dag eru ikki hendingar, sum hava týðandi ávirkan á ársroknskapin.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri P/F Vága Floghavn er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva konsernini fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr konsernini, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## Nýttur roknskaparháttur

**Konsernroknskapurin**

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið P/F Vága Floghavn og atknýtt felag, har P/F Vága Floghavn beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

**Minnilutaáhugamál**

Í konsernroknskapinum verða roknskaparpostarnir hjá atknýttum fyritøkum innroknaðir 100%. Tann lutfalsligi partur, sum minnilutaáhugamál eiga av úrsliti og eginogn hjá atknýttum fyritøkum, verður javnaður árliga og verður vístur fyri seg niðanfyri rakstrarroknskapin og í serligum høvuðsposti undir eginognini.

### Rakstrarroknskapurin

**Bruttoúrslit**

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

**Vørunýtsla**

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av vørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroytingar í árinum.

**Aðrar rakstrarinntøkur**

Aðrar rakstrarinntøkur umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap av áognarum og operationellar leasingkostnaðir.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

## Nýttur roknskaparháttur

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

### Inntøkur av kapitalparti í atknýttum feløgum

Í móðurfelags rakstrarroknskapinum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýttum felagi innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

### Skattur av ársúrslitinum

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

## Fíggjarstøðan

### Immateriell støðisogn

Immateriell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Telduskipanir | 5 ár | 0 % |

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

## Nýttur roknskaparháttur

Jøvn avskriving verður framd grundað á niðanfyristandandi meting av væntaðu brúkstíðunum og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Slitlag o.a. | 15 ár | 0 % |
| Bygningar, brunnar v.m. | 50 ár | 40 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-10 ár | 0-20 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís við frádrátti av sølukostnaðum og roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

### Leasingsáttmálar

Leasingsáttmálar viðvíkjandi materiellari støðisogn, har konsernini hevur allar týðandi váðar og fyrimunir, ið eru knýttir at ognarrættinum (fíggjarlig leasing), verða virðisásettir við fyrstu innrokning í fíggjarstøðuni til lægsta virði av dagsvirði ella nútíðarvirði av framtíðar leasinggjøldunum. Tá nútíðarvirðið verður útroknað, verður innanhýsis rentan í leasingsáttmálanum ella lánsrentan hjá felagnum nýtt sum diskonteringsfaktor. Fíggjarlig leasað støðisogn verður hereftir viðgjørd sum onnur tilsvarandi materiell støðisogn.

Kapitaliseraða restleasingskyldan verður innroknað í fíggjarstøðuna sum ein skylda, og renturnar, sum eru partur av leasinggjøldunum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin yvir gildistíðina hjá sáttmálanum.

Allir aðrir leasingsáttmálar vera mettir sum operationell leasing. Gjøld í sambandi við operationella leasing og aðrar leiguavtalur verða innroknað í rakstrarroknskapin yvir gildistíðina hjá sáttmálanum. Samlaða skuldin hjá Koncernens viðvíkjandi operationellum leasingsáttmálum og leiguavtalum verður upplýst undir eventualskyldum.

### Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á bæði immateriellari og materiellari støðisogn, umframt kapitalpørtum í dótturfyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

### Innrætting av leigaðum hølum

Innrætting av leigaðum hølum verður virðisásett til útveganarvirði við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðina hjá ognini, sum er sett til 10 ár.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarlig støðisogn

**Kapitalpartar í atknýttum feløgum**

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá felagnum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi.

Nettouppskriving av kapitalparti í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum.  Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognin í atknýttum feløgum.

**Vørugoymslur**

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og hjálpartilfari fevnir um keypsprís umframt flutningsgjald.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Eginogn

**Yvirkursur við partabrævaútgávu**

Yvirkursur við partabrævaútgávu umfatar upphæddir, ið eru inngoldnar sum yvirkursur í mun til teknaðu kapitalpartarnar. Kostnaðir í sambandi við avgreidda partabrævaútgávu verður trekt frá yvirkursupphæddini. Tiltaksgrunnur til yvirkurs kann nýtast til vinningsbýti, grunnútgávu og at rinda hall.

**Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum**

Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum fevnir um nettouppskrivingar av kapitalpartum í dótturfyritøkum í mun til útveganarvirði.

Grunnurin kann eliminerast við halli, avhending av kapitalpartum og broyting í roknskaparligum metingum.

## Nýttur roknskaparháttur

Grunnurin kann ikki innroknast við einari negativari upphædd.

**Vinningsbýti**

Vinningsbýti, sum væntandi verður útgoldið fyri roknskaparárið, verður tikið við sum serstakur postur undir eginognini. Uppskot til vinningsbýti verður tikið við sum skylda, tá tað er samtykt á aðalfundi.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

**Skuld**

Skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld, sum viðvíkja inntøkum komandi ár.

## Pengastreymsuppgerð

Pengastreymsuppgerðin vísir pengastreymarnar hjá konsernini og móðurfelagnum frá rakstri, íløgum og fígging fyri árið og broytingar í tøkum peningi umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

Tá feløg verða keypt ella seld, verður gjaldførisávirkanin víst fyri seg undir pengastreymum frá íløgum. Í pengastreymsuppgerðini verða pengastreymar viðvíkjandi keyptum feløgum innroknaðir frá útveganardegnum, og pengastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða innroknaðir fram til søludagin.

**Pengastreymar frá rakstri**

Pengastreymar frá rakstri verða gjørdir upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskattur.

## Nýttur roknskaparháttur

### Pengastreymar frá íløgum

Pengastreymar frá íløgum umfata gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av støðisogn.

### Pengastreymar frá fígging

Pengastreymar frá fígging umfata broytingar í stødd ella samanseting av felagskapitali og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt umfata pengastreymarnir lántøku, avdráttir av rentuberandi skuld og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening umframt stuttfreistað virðisbrøv, ið lætt kunnu umbýtast við tøkan pening, og har tað er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2023 | 2022 | 2023 | 2022 |
| Nota | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| | Nettosøla | 178.262.398 | 160.057 | 74.395.310 | 68.697 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 72.282 | 311 | 72.282 | 311 |
| | Kostnaðir til vørur og hjálpartilfar | -65.382.458 | -56.757 | -2.113.285 | -1.669 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -30.859.862 | -24.090 | -26.087.979 | -19.474 |
| | **Bruttoúrslit** | **82.092.360** | **79.521** | **46.266.328** | **47.865** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -41.530.123 | -37.649 | -31.705.541 | -28.832 |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | -17.433.037 | -18.571 | -16.750.608 | -17.882 |
| | **Rakstrarúrslit** | **23.129.200** | **23.301** | **-2.189.821** | **1.151** |
| | Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 10.095.955 | 8.841 |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 2.762 | 7 | 0 | 0 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -4.739.860 | -1.774 | -4.042.360 | -1.181 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **18.392.102** | **21.534** | **3.863.774** | **8.811** |
| 2 | Skattur av ársúrsliti | -4.432.373 | -3.882 | 0 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **13.959.729** | **17.652** | **3.863.774** | **8.811** |
| | Úrslit hjá minnilutaáhugamálum | -10.095.955 | -8.841 | 0 | 0 |
| | **Konsernsins partur av ársúrslitinum** | **3.863.774** | **8.811** | **3.863.774** | **8.811** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum | 10.095.955 | 8.842 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | -6.232.181 | -31 |
| **Býtt tilsamans** | **3.863.774** | **8.811** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | Konsern 2023 kr. | Konsern 2022 t.kr. | Móðurfelag 2023 kr. | Móðurfelag 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | | | |
| 3 | Ritbúnaður | 28.267 | 78 | 0 | 0 |
| | Immateriell støðisogn tilsamans | 28.267 | 78 | 0 | 0 |
| 4 | Lendi og flogbreyt | 668.680.230 | 646.688 | 668.680.230 | 646.689 |
| 5 | Bygningar, brunnar v.m. | 197.898.868 | 164.491 | 197.898.868 | 164.491 |
| 6 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 46.416.445 | 38.912 | 46.126.556 | 38.788 |
| 8 | Innrætting av hølum | 1.388.776 | 1.944 | 0 | 0 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 914.384.319 | 852.035 | 912.705.654 | 849.968 |
| 9 | Kapitalpartur í atknýttum felagi | 0 | 0 | 11.943.944 | 9.848 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 0 | 0 | 11.943.944 | 9.848 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **914.412.586** | **852.113** | **924.649.598** | **859.816** |
| | **Ogn í umferð** | | | | |
| | Handilsvørur | 5.349.237 | 5.646 | 0 | 0 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 5.349.237 | 5.646 | 0 | 0 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 5.569.762 | 5.214 | 5.550.606 | 4.648 |
| | Áogn hjá atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 1.735.620 | 1.249 |
| | Útsett skattaáogn | 74.148 | 45 | 0 | 0 |
| | Onnur áogn | 13.929.338 | 838 | 10.107.312 | 276 |
| 10 | Tíðaravmarkingar | 3.301.365 | 496 | 2.875.016 | 496 |
| | Áogn tilsamans | 22.874.613 | 6.593 | 20.268.554 | 6.669 |
| | Tøkur peningur | 35.915.778 | 42.887 | 14.568.042 | 23.187 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **64.139.628** | **55.126** | **34.836.596** | **29.856** |
| | **OGN TILSAMANS** | **978.552.214** | **907.239** | **959.486.194** | **889.672** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | Konsern 2023 kr. | Konsern 2022 t.kr. | Móðurfelag 2023 kr. | Móðurfelag 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | | | |
| 11 | Felagskapitalur | 508.500.000 | 508.500 | 508.500.000 | 508.500 |
| 12 | Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu | 304.495.622 | 304.496 | 304.495.622 | 304.496 |
| 13 | Grunnur fyri nettoopskriving eftir innaravirðisháttinum | 0 | 0 | 10.943.945 | 8.848 |
| 14 | Flutt úrslit | 25.072.892 | 21.209 | 14.128.947 | 12.361 |
| | **Eginogn áðrenn minnilutapartar** | **838.068.514** | **834.205** | **838.068.514** | **834.205** |
| 15 | Minnilutaáhugamál | 11.943.943 | 9.848 | 0 | 0 |
| | **Skuld** | | | | |
| 16 | Skuld til peningastovnar | 94.538.396 | 45.066 | 94.538.396 | 45.066 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 94.538.396 | 45.066 | 94.538.396 | 45.066 |
| | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 1.329.693 | 3.625 | 1.329.693 | 3.625 |
| | Skuld til peningastovnar | 20.304 | 0 | 20.304 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 25.484.743 | 7.601 | 23.277.660 | 4.746 |
| | Partafelagsskattur | 4.461.130 | 4.374 | 0 | 0 |
| | Onnur skuld | 2.705.491 | 2.140 | 2.251.627 | 2.030 |
| 17 | Tíðaravmarkingar | 0 | 380 | 0 | 0 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 34.001.361 | 18.120 | 26.879.284 | 10.401 |
| | **Skuld tilsamans** | **128.539.757** | **63.186** | **121.417.680** | **55.467** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **978.552.214** | **907.239** | **959.486.194** | **889.672** |

**18 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**19 Nærstandandi partar**

## Eginognaruppgerð fyri konsernina

| | Felags-kapitalur t.kr. | Yvirkursur við partabræva-útgávu t.kr. | Grunnur fyri nettoupp-skrivingar eftir innara-virðis-háttinum t.kr. | Flutt úrslit t.kr. | Tilsamans t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn 1. januar 2022 | 508.500 | 304.496 | 0 | 12.399 | 825.395 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 0 | 8.810 | 8.810 |
| Eginogn 1. januar 2023 | 508.500 | 304.496 | 0 | 21.209 | 834.205 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 0 | 3.864 | 3.864 |
| | **508.500** | **304.496** | **0** | **25.073** | **838.069** |

## Eginognaruppgerð fyri móðurfelag

| | Felags-kapitalur t.kr. | Yvirkursur við partabræva-útgávu t.kr. | Grunnur fyri nettoupp-skriving eftir innaravirðis-háttinum t.kr. | Flutt úrslit t.kr. | Tilsamans t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn 1. januar 2022 | 508.500 | 304.496 | 5.007 | 7.392 | 825.395 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 8.841 | -31 | 8.810 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -5.000 | 0 | -5.000 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 0 | 5.000 | 5.000 |
| Eginogn 1. januar 2023 | 508.500 | 304.496 | 8.848 | 12.361 | 834.205 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 10.096 | -6.232 | 3.864 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -8.000 | 0 | -8.000 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 0 | 8.000 | 8.000 |
| | **508.500** | **304.496** | **10.944** | **14.129** | **838.069** |

## Pengastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember

| Nota | | Konsern 2023 kr. | Konsern 2022 t.kr. | Móðurfelag 2023 kr. | Móðurfelag 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ársúrslit | 3.863.774 | 8.811 | 3.863.774 | 8.811 |
| 20 | Javningar | 36.626.181 | 31.937 | 10.624.731 | 9.096 |
| 21 | Broyting í rakstrarpeningi | 2.108.199 | -774 | 5.151.104 | 891 |
| | Pengastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | 42.598.154 | 39.974 | 19.639.609 | 18.798 |
| | Rentuinngjaldingar og líknandi | 0 | -1 | -3 | 1 |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -4.737.098 | -1.768 | -4.042.360 | -1.181 |
| | Pengastreymar frá vanligum rakstri | 37.861.056 | 38.205 | 15.597.246 | 17.618 |
| | Goldin partafelagsskattur | -4.373.719 | -912 | 0 | 0 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **33.487.337** | **37.293** | **15.597.246** | **17.618** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -79.744.228 | -19.713 | -79.501.216 | -18.231 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 87.999 | 516 | 87.999 | 516 |
| | Móttikið vinningsbýti | 0 | 0 | 8.000.000 | 5.000 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-79.656.229** | **-19.197** | **-71.413.217** | **-12.715** |
| | Broyting í langfreistaðari skuld | 47.177.269 | -3.469 | 47.177.269 | -3.469 |
| | Goldið vinningsbýti | -8.000.000 | -5.000 | 0 | 0 |
| | Broyting í stuttfreistað skuld til peningastovnar | 20.101 | -23 | 20.307 | -23 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **39.197.370** | **-8.492** | **47.197.576** | **-3.492** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **-6.971.522** | **9.604** | **-8.618.395** | **1.411** |
| | Tøkur peningur primo | 42.887.300 | 33.283 | 23.186.437 | 21.776 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **35.915.778** | **42.887** | **14.568.042** | **23.187** |

| | Konsern 2023 kr. | Konsern 2022 t.kr. | Móðurfelag 2023 kr. | Móðurfelag 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **Tøkur peningur** | | | | |
| Tøkur peningur | 35.915.778 | 42.887 | 14.568.042 | 23.187 |
| **Tøkur peningur ultimo** | **35.915.778** | **42.887** | **14.568.042** | **23.187** |

# Notur

| | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2023 | 2022 | 2023 | 2022 |
| | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | | | |
| | Lønir | 35.720.323 | 32.384 | 27.323.300 | 24.846 |
| | Eftirlønir | 4.048.622 | 3.699 | 3.037.815 | 2.793 |
| | Onnur almenn gjøld | 1.761.178 | 1.566 | 1.344.426 | 1.193 |
| | | **41.530.123** | **37.649** | **31.705.541** | **28.832** |
| | Stjórn & nevnd | 1.633.312 | 1.632 | 1.629.112 | 1.628 |
| | Starvsfólk í miðal | 68 | 65 | 49 | 47 |
| **2.** | **Skattur av ársúrsliti** | | | | |
| | Skattur av ársúrsliti | 4.461.130 | 3.918 | 0 | 0 |
| | Broyting í útsettum skatti | -28.757 | -36 | 0 | 0 |
| | | **4.432.373** | **3.882** | **0** | **0** |

| | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **3.** | **Ritbúnaður** | | | | |
| | Útveganarvirði primo | 1.335.057 | 1.335 | 0 | 0 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **1.335.057** | **1.335** | **0** | **0** |
| | Av- og niðurskrivingar primo | -1.256.806 | -1.193 | 0 | 0 |
| | Ársins av-/niðurskrivingar | -49.984 | -64 | 0 | 0 |
| | **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-1.306.790** | **-1.257** | **0** | **0** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **28.267** | **78** | **0** | **0** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **4. Lendi og flogbreyt** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 694.470.057 | 687.693 | 694.470.057 | 687.693 |
| Tilgongd í árinum | 26.167.469 | 6.776 | 26.167.469 | 6.777 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **720.637.526** | **694.469** | **720.637.526** | **694.470** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -47.780.644 | -42.964 | -47.780.644 | -42.964 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -4.176.652 | -4.817 | -4.176.652 | -4.817 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-51.957.296** | **-47.781** | **-51.957.296** | **-47.781** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **668.680.230** | **646.688** | **668.680.230** | **646.689** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| **5. Bygningar, brunnar v.m.** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 209.695.912 | 205.605 | 209.695.912 | 205.605 |
| Tilgongd í árinum | 37.794.606 | 4.090 | 37.794.606 | 4.090 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **247.490.518** | **209.695** | **247.490.518** | **209.695** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -45.203.204 | -40.756 | -45.203.204 | -40.756 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -4.388.446 | -4.448 | -4.388.446 | -4.448 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-49.591.650** | **-45.204** | **-49.591.650** | **-45.204** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **197.898.868** | **164.491** | **197.898.868** | **164.491** |

| | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **6.** | **Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv** | | | | |
| | Útveganarvirði primo | 111.072.090 | 105.713 | 106.991.199 | 101.632 |
| | Tilgongd í árinum | 15.782.154 | 7.364 | 15.539.142 | 7.364 |
| | Frágongd í árinum | -157.180 | -2.005 | -157.180 | -2.005 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **126.697.064** | **111.072** | **122.373.161** | **106.991** |
| | Av- og niðurskrivingar primo | -72.159.756 | -65.184 | -68.202.558 | -61.385 |
| | Ársins av-/niðurskrivingar | -8.262.326 | -8.775 | -8.185.510 | -8.617 |
| | Av-/niðurskrivingar, avhendaðar ognir | 141.463 | 1.799 | 141.463 | 1.799 |
| | **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-80.280.619** | **-72.160** | **-76.246.605** | **-68.203** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **46.416.445** | **38.912** | **46.126.556** | **38.788** |
| **7.** | **Materiell støðisogn í gerð og undangjøld fyri materiella støðisogn** | | | | |
| | Útveganarvirði primo | 0 | 608 | 0 | 0 |
| | Flytingar | 0 | -608 | 0 | 0 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **0** | **0** | **0** | **0** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **8. Innrætting av hølum** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 3.378.317 | 1.288 | 0 | 0 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 2.090 | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **3.378.317** | **3.378** | **0** | **0** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -1.433.911 | -966 | 0 | 0 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -555.630 | -468 | 0 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-1.989.541** | **-1.434** | **0** | **0** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **1.388.776** | **1.944** | **0** | **0** |
| **9. Kapitalpartur í atknýttum felagi** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 1.000.000 | 1.000 |
| **Útvegnarvirði ultimo** | **0** | **0** | **1.000.000** | **1.000** |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 8.847.989 | 5.007 |
| Ársúrslit, áðrenn avskrivingar av goodwill | 0 | 0 | 10.095.955 | 8.841 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -8.000.000 | -5.000 |
| **Uppskrivingar ultimo** | **0** | **0** | **10.943.944** | **8.848** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **0** | **0** | **11.943.944** | **9.848** |

**Atnýttar fyritøkur:**

| | Heimstaður | Ognarpartur |
|---|---|---|
| P/F Duty Free | Sørvágur | 50 % |

| | Konsern 31/12 2023 kr. | Konsern 31/12 2022 t.kr. | Móðurfelag 31/12 2023 kr. | Móðurfelag 31/12 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **10. Tíðaravmarkingar** | | | | |
| Forútgjaldingar | 3.301.365 | 496 | 2.875.016 | 496 |
| | **3.301.365** | **496** | **2.875.016** | **496** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **11. Felagskapitalur** | | | | |
| Felagskapitalur primo | 508.500.000 | 508.500 | 508.500.000 | 508.500 |
| | **508.500.000** | **508.500** | **508.500.000** | **508.500** |

Felagskapitalurin er býttur sundur í partabrøv á kr. 1,00 og multipla av hesum. Øll partabrøvini hava somu rættindi.

Tey seinastu 5 árini hava hesar rørslur verið á felagskapitalinum:

Kapitalhækking í 2020: 15.000.000 kr.

| | Konsern 31/12 2023 kr. | Konsern 31/12 2022 t.kr. | Móðurfelag 31/12 2023 kr. | Móðurfelag 31/12 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **12. Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu** | | | | |
| Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu primo | 304.495.622 | 304.496 | 304.495.622 | 304.496 |
| | **304.495.622** | **304.496** | **304.495.622** | **304.496** |

| | Konsern 31/12 2023 kr. | Konsern 31/12 2022 t.kr. | Móðurfelag 31/12 2023 kr. | Móðurfelag 31/12 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **13. Grunnur fyri nettoopskriving eftir innaravirðisháttinum** | | | | |
| Grunnur fyri uppskriving primo | 0 | 0 | 8.847.990 | 5.007 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 10.095.955 | 8.841 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -8.000.000 | -5.000 |
| | **0** | **0** | **10.943.945** | **8.848** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2023 | 31/12 2022 | 31/12 2023 | 31/12 2022 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **14. Flutt úrslit** | | | | |
| Flutt úrslit primo | 21.209.118 | 12.398 | 12.361.128 | 7.392 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 3.863.774 | 8.811 | -6.232.181 | -31 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 8.000.000 | 5.000 |
| | **25.072.892** | **21.209** | **14.128.947** | **12.361** |
| **15. Minnilutaáhugamál** | | | | |
| Minnilutaáhugamál primo | 9.847.988 | 6.007 | 0 | 0 |
| Minnilutaáhugamál | 10.095.955 | 8.841 | 0 | 0 |
| Vinningsbýti | -8.000.000 | -5.000 | 0 | 0 |
| | **11.943.943** | **9.848** | **0** | **0** |
| **16. Skuld til peningastovnar** | | | | |
| Skuld til peningastovnar tilsamans | 95.868.089 | 48.691 | 95.868.089 | 48.691 |
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | -1.329.693 | -3.625 | -1.329.693 | -3.625 |
| | **94.538.396** | **45.066** | **94.538.396** | **45.066** |
| Partur av skuld, sum fellur til gjaldingar aftaná 5 ár | 88.437.698 | 29.918 | 88.437.698 | 29.918 |
| **17. Tíðaravmarkingar** | | | | |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 380 | 0 | 0 |
| | **0** | **380** | **0** | **0** |

**18. Veðsetingar og trygdarveitingar**

Sum trygd fyri skuld til peningastovnar, 95.868 t.kr., hevur móðurfelagið latið veð í fastari ogn, hvørs roknskaparligu virðir pr. 31. desember 2023 eru 866.579 t.kr. Veðsetingin er í mesta lagi 300 mió.kr.

**18. Veðsetingar og trygdarveitingar (framhald)**

Móðurfelagið hevur veitt 200 t.kr. sum trygd fyri tollkreditti.

Konsernin hevur veitt 1.200 t.kr. sum trygd fyri tollkreditti.

**19. Nærstandandi partar**

**Eigaraviðurskifti**

Hesi eru skrásett í partabrævabók felagsins at eiga meira enn 5% av atkvøðunum ella meira enn 5% av partabrøvunum:
Føroya Land

Handilstiltøk

Felagið hevur í árinum havt samhandil við nærstandandi partar. Selt er til marknaðartreytir.

**20. Javningar**

| | Konsern 2023 kr. | Konsern 2022 t.kr. | Móðurfelag 2023 kr. | Móðurfelag 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 17.433.037 | 18.571 | 16.750.608 | 17.881 |
| Vinningur / tap við avhending av støðisogn | -72.282 | -311 | -72.282 | -311 |
| Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | -10.095.955 | -8.841 |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 4.737.098 | 1.768 | 4.042.360 | 1.181 |
| Skattur av ársúrsliti | 4.432.373 | 3.882 | 0 | 0 |
| Aðrar avsettar skyldur | 0 | -814 | 0 | -814 |
| Úrslit hjá minnilutaáhugamálum | 10.095.955 | 8.841 | 0 | 0 |
| | **36.626.181** | **31.937** | **10.624.731** | **9.096** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 2023 | 2022 | 2023 | 2022 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **21. Broyting í rakstrarpeningi** | | | | |
| Broyting í vørugoymslum | 296.497 | -234 | 0 | 0 |
| Broyting í áogn | -16.257.361 | -1.326 | -13.602.946 | -1.251 |
| Broyting í vøru- og tænastuskuld og aðrari skuld | 18.069.063 | 786 | 18.754.050 | 2.142 |
| | **2.108.199** | **-774** | **5.151.104** | **891** |